HEILSUMÁLARÁÐIÐ

INNANHÝS

Is

Tann: 17. mai 2022
Mál: 21/23628-31
Viðgjørt: BL

**Tilmæli til landsstýrismannin**

**um**

**Heilsugranskingareind innan Sjúkrahúsverkið**

## 1. Inngangur

"Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum" varð handað landsstýrismanninum tann 17. september 2021.

Í ætlanini verður mælt til at stovnseta eitt Fólkaheilsustýri og eina heilsugranskingareind í Føroyum. Mælt verður til, at praktisku viðurskiftini kring Fólkaheilsustýrið og praktisku viðurskiftini kring Heilsugranskingareindina, koma uppá pláss samstundis.

Í ætlanini verður mælt til, at tann heilsugransking, herundir ílegugransking, sum í dag fer fram á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverkinum, Ílegusavninum og Fólkaheilsuráðnum, verður skipað í einari Heilsugranskingareind. Mælt verður til at staðseta heilsugranskingina í Føroyum samlað á einum stað, helst innan Sjúkrahúsverkið, nær økinum, har Fólkaheilsustýrið er staðsett. Hetta soleiðis, at Fólkaheilsustýrið og heilsugranskingin kunnu fáa ágóðan hvør av øðrum.

Tá ið ætlan um Fólkaheilsustýrið varð handað, varð arbeiðsbólkur settur at gera eitt tilmæli til landsstýrismannin í heilsumálum um stovnsetan av einari Heilsugranskingareind. Sum grundarlag undir arbeiðinum verður nýtt: "Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum", september 2021.

Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum er, at:

1. Finna hóskandi hølir til Heilsugranskingareindina nær økinum, har Fólkaheilsustýrið er staðsett,
2. Finna eina loysn í mun til, hvussu umsiting av játtanum til heilsugransking og bókhald hjá heilsugranskarum skal skipast í Heilsugranskingareindini,
3. Umrøða og koma við tilmæli um, hvussu Heilsugranskingareindin verður skipað, herundir í mun til leiðslu og førleikar,
4. Umrøða nær teir heilsugranskarar, sum í løtuni eru staðsettir í Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavninum, herundir heilsugranskarar í FarGen verkætlanini, fáa tilboð um pláss í Heilsugranskingareindini,

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • www.hmr.fo • hmr@hmr.fo

5. Onnur praktisk viðurskifti viðvíkjandi Heilsugranskingareindini.

Arbeiðsbólkurin letur landsstýrismanninum í heilsumálum eitt tilmæli um omanfyristandandi viðurskifti. Miðað verður ímóti, at tilmælið verður handað landsstýrismanninum tann 1. juni 2022.

Arbeiðsbólkurin varð settur tann 7. desember 2021, til at loysa omanfyristandandi arbeiðssetning. Í arbeiðsbólkinum hava verið:

- Turid Arge, aðalstjóri, Heilsumálaráðið, forkvinna
- Steinar Eirikstoft, stjóri, Sjúkrahúsverkið
- Pál Weihe, leiðari/yvirlækni, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
- Guðrið Andorsdóttir, stjóri, Ílegusavnið
- Magni Mohr, formaður, Fólkaheilsuráðið
- Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðingur, Heilsumálaráðið, samskipari

## 1. Staðseting og hølir

Ein partur av arbeiðssetninginum er at finna hóskandi hølir til Heilsugranskingareindina.

### *a. Staðseting*

Sum omanfyrinevnt, varð í "Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum" mælt til, at heilsugranskingin í Føroyum verður samlað á einum stað, helst innan Sjúkrahúsverkið. Hetta hevur verið umrøtt í arbeiðsbólkinum, og semja er um at mæla til, at Heilsugranskingareindin verður skipað, sum ein eind innan Sjúkrahúsverkið.

Um heilsugranskingin verður staðsett sama stað, ber til at fáa eitt granskingarumhvørvi, har granskarar hava møguleika til at sparra saman, deila vitan og royndir, og á tann hátt fáa sínámillum samstarv og samvirkna. Á henda hátt ber til at lyfta heilsugranskingina í Føroyum upp á eitt enn hægri støði, enn hon er í dag.

Í omanfyrinevndu ætlan verður eisini mælt til, at Heilsugranskingareindin skal staðsetast nær økinum, har Fólkaheilsustýrið er staðsett. Avgerð er tikin um, at Fólkaheilsustýrið verður staðsett á Eirargarði 2, Tórshavn.

Hóskandi hølir til Heilsugranskingareindina hava verið umrødd. Tá ið virksemið á Psykiatriska deplinum flytir oman í H-bygningin, verða hølir hjá Sjúkrahúsverkinum tøk á Eirargarði. Mett verður, at hølini á Eirargarði 17 ella 19, Tórshavn, eru hóskandi hølir til Heilsugranskingareindina. Í bygninginum er tunnilssamband, soleiðis at gott samband kann vera ímillum Heilsugranskingareindina og restina av Sjúkrahúsverkinum, herundir til klinikk, frystirum v.m. Hesin bygningur liggur eisini tætt við Fólkaheilsustýrið. Á henda hátt fer at bera til at fáa betri samstarv og samvirkna ímillum Heilsugranskingareindina, restina av Sjúkrahúsverkinum og Fólkaheilsustýrið.

Sjúkrahúsverkið hevur biðið Landsverk um at gera meting av, hvat tað kostar at umvæla bygning til Heilsugranskingareind. Sum nú er, eru bygningarnir í sera ringum standi. Um bygningurin skal um spartlast, málast, kostar hetta uml. 8.000 kr. pr. fermetur; um umvælast skal innan, kosta hetta 12.000 kr. pr. fermetur; um eisini umvælast skal útvendiga kostar hetta 20.000 kr. pr. fermetur. Talan er um uml. 500 fermetrar.

**Mælt verður til,** at Heilsugranskingareindin verður skipað í verandi bygningi hjá Sjúkrahúsverkinum á Eirargarði 17 ella 19, Tórshavn.

### *b. Hølir*

Í Heilsugranskingareindini er neyðugt at hava skrivstovuhølir, sum heilsugranskarar kunnu nýta til gransking. Tá ið heilsugranskingin verður umrødd, verður hugsað um ta heilsugransking, sum í dag hevur pláss í Sjúkrahúsverkinum, á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, á Ílegusavninum og FarGen verkætlanini.

Fyri at fáa upplýst, hvussu nógv skrivstovupláss, tørvur er á í Heilsugranskingareindini, hevur arbeiðsbólkurin fingið lýsingar frá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ílegusavninum og FarGen verkætlanini.

Vísandi til hesar lýsingar, hevur Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu tørv á uml. 15 plássum til heilsugranskarar, Ílegusavnið hevur tørv á 7 plássum til heilsugranskarar og FarGen hevur tørv á 3 plássum til heilsugranskarar. Tilsamans er tørvur á uml. 25 plássum. Sjúkrahúsverkið hevur upplýst, at omanfyrinevndu lýsingar inkludera heilsugranskararnar innan Sjúkrahúsverkið. Tað vil siga, at tað tilsamans er tørvur á uml. 25 plássum til heilsugranskarar í Heilsugranskingareindini.

Harumframt er tørvur á hølum til leiðara, stuðulsfunktión og fundarhøli til fundir og undirvísing.

Í verandi hølum hava heilsugranskararnir skrivstovuútgerð. Partur av hesari skrivstovuútgerð verður partur av Fólkaheilsustýrinum, ímeðan partur av skrivstovuútgerðini verður flutt til Heilsugranskingareindina. Umframt tað, er tørvur á nakað av nýggjari skrivstovuútgerð, umframt at gera seingjarstovur til kóntórhølir. Til hetta krevst, at úttøk til el og net verður lagt inn.

Harumframt er tørvur á klinikk, kanningar/royndarrúmi, lagurhøli til journalir, rúm til reinsan av DNA, frystirúm, audiometrirúmi og bíðihøli. Neyðugt er ikki, at hetta er sama stað sum Heilsugranskingareindin, men neyðugt er, at heilsugranskararnir hava atgongd til klinikk, kanningarrum v.m.

Neyðugt er ikki at staðseta klinisku granskingina í Heilsugranskingareindini, men neyðugt er, at kliniska granskingin fær pláss og góðar treytir, við lættari atgongd til klinikk og biobanka í Sjúkrahúsverkinum.

Heilsugranskararnir fáa atgongd til biobankan í Sjúkrahúsverkinum og fáa atgongd til klinikk, tá ið hølir eru tøk til endamálið.

*Serligt viðv. FarGen verkætlanini*

Sambært lýsing frá FarGen verkætlanini, fevnir FarGen verkætlanin um: Infrastruktur, gransking og diagnostikk. Uppgávan hjá FarGen verkætlanini er at menna eitt undirstøðukervi til ílegugransking í Føroyum og verður hetta gjørt við at fáa loyvi uppá pláss og útvega luttakarar, fremja ílegulesing og greina ílegudáturnar. Granskingin kemur eftir hetta, t.v.s. granskarar kunnu síðani søkja um loyvi at nýta dáturnar til at kanna ymiskar sjúkur, sum í síðsta enda skal stuðla undir persónlagað medisin. Hesar granskingarverkætlanirnar verða fíggjaðar uttanhýsis t.d. av Granskingarráðnum. FarGen verkætlanin hevur eina játtan á 3 mió. Kr. á føroysku fíggjarlógini, og fer henda játtan at kalla øll til rakstur.

Í "Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum" verður mælt til, at tann parturin av FarGen verkætlanini, sum inniber gransking, verður staðsettur í Heilsugranskingareindini, ímeðan sjálvt undirstøðukervið til ílegugransking, verður staðsett í Fólkaheilsustýrinum. Hetta av tí, at heilsugransking ikki verður partur av Fólkaheilsustýrinum. Sambært hesum, skal heilsugranskingin í FarGen verkætlanini flytast til Heilsugranskingareindina.

**Mælt verður til,** at tað í Heilsugranskingareindini verða skrivstovuhølir, har pláss er fyri umleið 25 heilsugranskarum. Teir heilsugranskarar, sum í dag hava pláss í Sjúkrahúsverkinum, Deildini

fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ílegusavninum og FarGen verkætlanini, skulu fáa tilboð um pláss í Heilsugranskingareindini. Heilsugranskararnir skulu, tá ið hølini eru klár til tess, hava atgongd til klinikk, kanningarrúm/royndarrúm, lagurhøli til journalir, rúm til reinsan av DNA og frystirúm, hóast hetta ikki nýtist at vera staðsett sama stað, sum Heilsugranskingareindin. Umframt hølir til heilsugranskarar, er tørvur til hølir til ein leiðara, stuðulsfunktión og fundarhøli til fundir og undirvísing.

Í verandi hølum hava heilsugranskararnir skrivstovuútgerð. Partur av hesari skrivstovuútgerð verður partur av Fólkaheilsustýrinum, ímeðan partur av skrivstovuútgerðini verður flutt til Heilsugranskingareindina. Umframt tað, er tørvur á nýggjari skrivstovuútgerð, umframt at gera seingjarstovur til kóntórhølir viðv. KT. Til hetta krevst, at úttøk til el og net verður lagt inn.

## 2. Skipan av játtan og bókhaldi

Annar partur av arbeiðssetninginum er at finna eina loysn í mun til, hvussu umsiting av játtanum til heilsugransking og bókhald hjá heilsugranskarum skal skipast í Heilsugranskingareindini. Til hetta hevur arbeiðsbólkurin fingið eina lýsing frá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavninum um, hvussu hetta arbeiðið er skipað.

Á ***Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu*** tekur eitt starvsfólk sær av tí fíggjarliga, herundir játtanum og fíggjarviðurskiftum viðvíkjandi granskingarverkætlanum.

Starvsfólkið hevur tvær høvuðsuppgávur viðvíkjandi granskingarverkætlanunum: at tryggja at peningur, sum er játtaður, kemur inn, og at rokningar verða goldnar til tíðina. Undir hesum liggja sjálvandi fleiri uppgávur. Fíggjarfólkið syrgir fyri at heinta pening inn í teimum ymisku granskingarverkætlanunum, sambært teimum tilsøgnum sum fyriliggja. Í summum førum verður eisini hjálpt við at søkja um stuðul.

Verkætlanirnar á DfAA hava í løtuni stuðlar í Føroyum, Danmark og USA. Av tí at granskingarinntøkurnar koma nógva ymsa staðni frá, eru treytirnar sum fylgja við tilsøgnunum ofta ymiskar, og neyðugt at seta seg inn í, hvussu treytirnar hjá hvørjum einstøkum stuðulsveitara eru. Stuðulspengarnir kunna verða goldnir forút, afturút ella í ratum.

Tær fíggjarligu rapportirnar verða gjørdar eftir tí leisti, ið hvør einstakur stuðul krevur og eru tær á føroyskum, donskum og enskum – og annars tekur fíggjarfólkið sær eisini av samskiftinum í hesum sambandi. Tá rapportir/rokningar verða sendar, er neyðugt at halda eyga við, um pengarnir koma, bókað í høvuðsbók, tá teir koma og rykkja, um teir ikki koma. Tá rokningar koma inn, bókar fíggjarfólkið hetta á røttu verkætlan.

Tryggjast skal, at fíggjarætlanin verður fylgd. Verkætlanarábyrgdarin/granskarin hevur ábyrgd av síni egnu verkætlan, men tað er bert við hjálp frá fíggjarfólkinum, at verkætlanarábyrgdarin/granskarin kann hava fult yvirlit yvir tann fíggjarliga partin av verkætlanini. Tí er tætt samstarv og samband millum fíggjarfólkið og verkætlanarábyrgdaran ein fortreyt, og tað er týdningarmikið, at verkætlanarábyrgdarar kunna fáa tær upplýsingar, teir hava tørv á, og at tey skilja upplýsingarnar.

***Ílegusavnið*** hevur eitt stovnsnummar til stuðulsfíggjað virksemi. Hvør verkætlan hevur eitt verkætlanarnummar. Granskingarstuðul og útreiðslur verða ávikavist inntøkuførdar og útreiðsluførdar í rakstrinum undir verkætlanarnumrunum. So at siga einki verður bókað á hesum stovnsnummarinum ógreinað. Við ársenda verða verkætlanirnar gjørdar upp og status flutt yvir á fíggjarstøðuna.

Í arbeiðsbólkinum er semja um, at tað er neyðugt, at eitt starvsfólk verður knýtt at Heilsugranskingareindini, sum tekur sær av játtan og bókhaldið hjá heilsugranskarum.

***Kunningartøkni***

Í arbeiðsbólkinum hevur verið umrøtt, hvussu uppgávan viðvíkjandi kunningartøkni skal verða loyst í Heilsugranskingareindini. Guðrið Andorsdóttir hevur gjørt eitt upprit til arbeiðsbólkin um hetta.

Í uppritinum verða lýst trygdarkrøv viðvíkjandi KT, sum stovnarnir skulu halda í dag. Neyðugt er, at fylgt verður upp uppá hesi trygdarkrøv við trygdargrannskoðan v.m., í nýggju Heilsugranskingareindini.

Í arbeiðsbólkinum er semja um, at eitt starvsfólk má vera knýtt til Heilsugranskingareindina, ið tekur sær av at umsita kunningartøkni og KT-trygdarkrøv. Landssjúkrahúsið er ein stovnur. Har er ein DPO settur, sum varar av øllum Sjúkrahúsverkinum. Ein persónur, sum arbeiður við kunningartøkni og KT-trygdarkrøvum í Heilsugranskingareindini, kemur neyðugt eisini at skriva/tryggja mannagongdir, sum fevna um allan stovnin og alt Sjúkrahúsverkið.

**Mælt verður til**, at tað, at Heilsugranskingareindini verður knýtt eitt fulltíðarsett starvsfólk, ella tvey starvsfólk hálva tíð, til at taka sær av játtan og bókhaldið hjá heilsugranskarum, umframt at taka sær av at umsita kunningartøkni og KT-trygdarkrøv.

## 3. Leiðsla í Heilsugranskingareindini

Triði partur av arbeiðssetninginum er at umrøða og koma við tilmæli um, hvussu Heilsugranskingareindin verður skipað, herundir í mun til leiðslu og førleikar.

Mett verður, at neyðugt er at seta ein leiðara, sum hevur yvirskipaðu fyrisitingarligu ábyrgdina av heilsugranskingini í Heilsugranskingareindini. Neyðugt er við einum leiðarastarvi til at loysa hesa uppgávu. Hesin leiðari eigur at vísa til leiðsluna á Landssjúkrahúsinum. Leiðarin skal taka sær av at samskipa arbeiðið í Heilsugranskingareindini, tryggja, at heilsugranskarar fáa nøktandi hjálp til at søkja um granskingarstuðul og tryggja, at peningur, sum er játtaður, kemur inn, umframt hjálp til at føra bókhald.

Organisatoriskt vísir Heilsugranskingareindin til leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

Mett verður, at leiðarin á Heilsugranskingareindini eigur at hava áleið hesar førleikar:

- Hava granskingarførleikar svarandi til á lektor ella professara stigi innan heilsuøkið,
- Hava leiðsluførleikar,
- Hava góð evni til at kveikja og stimbra gransking hjá ungum og óroyndum granskarum,
- Duga væl at profilera stovnin, soleiðis at stovnurin verður virdur í almenninginum,
- Duga at profilera stovnin, soleiðis at almenningurin hevur álit á gransingarstovninum og tí vilja viðvirka til ymiskar kanningar,
- Duga væl at knýta bond til altjóða fíggingarstovnar bæði í Europa og USA,
- Duga at fyrisita bæði strategiskt og operativt í gerandisdegnum,
- Hava kunnleika til fyrisitingarrætt og roknskaparreglur v.m.,
- Eigur at vera aktivur granskari við egnum granskingarverkætlanum.

**Mælt verður til,** at ein leiðari verður settur fyri Heilsugranskingareindina. Mælt verður til at seta leiðaran í fulltíðar starv.

## 4. Nær skal Heilsugranskingareindin stovnsetast

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, nær og hvussu teir heilsugranskarar, sum í løtuni hava pláss á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavninum, herundir heilsugranskarar í FarGen verkætlanini, fáa tilboð um at fáa pláss í hølum í Heilsugranskingareindini.

**Mælt verður til,** at arbeitt verður fram ímóti, at Heilsugranskingareindin verður sett á stovn 1. januar 2023. Í fyrstu atløgu verður Heilsugranskingareindin sett á stovn organisatoriskt, soleiðis at leiðari og starvsfólk verða sett v.m. Hølini til Heilsugranskingareind verða ikki klár pr. 1. januar 2023, men tá ið hølini eru klár, fáa omanfyrinevndu heilsugranskarar tilboð um pláss í Heilsugranskingareindini.

## 5. Avtala millum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið

Í arbeiðinum hevur verið umrøtt, at neyðugt er at gera eina formliga avtalu ímillum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið, um samstarv viðvíkjandi heilsugransking.

Í løtuni er samstarv millum Fróðskaparsetur Føroya, Landssjúkrahúsið, Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavnið um Depil fyri Heilsugransking. Talan er um eitt virtuelt granskingarsamstarv. Harumframt eru avtalur galdandi ímillum Fróðskaparsetrið, Landssjúkrahúsið og Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu um granskingarsamstarv. Avtalurnar eru undirskrivaðar í 2014. Avtalurnar við Sjúkrakassagrunnin fóru úr gildi í januar 2022. Neyðugt er nú at gera nýggja avtalu ímillum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið.

Í sambandi við samstarv við Esbjerg Sygehus, hevur Sjúkrahúsverkið móttikið avrit av: "Aftale om ledelsesmæssigt samarbejde om sundhedsvidenskabelig forskning, uddannelse og vidensdeling". Hetta er ein avtala, ið er gjørd millum Region Syddanmark og Syddansk Universitet. Avtalan inniheldur ásetingar um m.a., leiðslusamstarv, granskingarundirstøðukervi, Ph.d. útbúgving og útbúgving, vitansdeiling, vísindaligar setanir, projektpengar v.m. Talan er um eina høvuðsavtalu, við fleiri undiravtalum.

Tá ið Heilsugranskingareindin er stovnsett innan Sjúkrahúsverkið, eigur at verða arbeitt fram ímóti, at Sjúkrahúsverkið verður universitetssjúkrahús. Mett verður, at tað ber væl til at skipa Sjúkrahúsverkið í Føroyum sum universitetssjúkrahús. Mett verður eisini, at neyðugt er gera eina langtíðarætlan fyri heilsugransking í Føroyum.

Við Universitetssjúkrahús verður hugsað um m.a., eitt sjúkrahús, har tað er kliniskt virksemi, soleiðis at man kann taka lesandi innan heilsufak inn; har heilsugransking er; sjúkrahúsið hevur ein part av læknaútbúgvingini; møguleiki til at fáa akademiskan tittul og sjúkrahúsið skal samstarva við universitet um undirvísing. Mælt verður til, at arbeiðsbólkur verður settur til at fyrireika Sjúkrahúsverkið til at gerast Universitetssjúkrahús.

**Mælt verður til**, at samstarvsavtala verður gjørd ímillum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið, við útgangsstøði í omanfyristandandi avtalum. Mælt verður til, at høvuðsavtala verður tilevnað og undirskrivað so skjótt sum Heilsugranskingareindin er stovnsett og leiðari er settur, ímeðan undiravtalur verða tilevnaðar og undirskrivaðar, so við og við tá ið hetta verður mett neyðugt.

Mælt verður til, at arbeiðsbólkur verður settur til at fyrireika Sjúkrahúsverkið til at gerast Universitetssjúkrahús. Fyrsta raðfesting er tó at stovnseta eina Heilsugranskingareind og fáa hana at fungera væl.

Tórshavn, tann 17. Mai 2022

Turid Arge, Heilsumálaráðið

Steinar Eirikstoft, Sjúkrahúsverkið

Pál Weihe, DFAA

Guðrið Andorsdóttir, Ílegusavnið

Magni Mohr, Fólkaheilsuráðið

Birita Ludvíksdóttir, Heilsumálaráðið